# Moralurin er í toppi

**ÍF liðformaðurin heldur hetta vera heilt hugaligt, men hann vil hava allar armarnar niður aftur sum skjótast, tí annars fer einki at spyrjast burturúr á Skála**

ÍF SPÆLARIN

*Jóannes Hansen*

Eyðolvur R. Petersen er liðformaður í Fuglafirði. Um hann skal taka ímóti FM steypinum eina ferð í oktober vil hann einki tosa um.

- Árið er langt. Tað eru 75 stig eftir at spæla um, og tað er týdningarmikið hjá okkum at hava fokus á næstu uppgávuni. Tað verður á Skála nú sunnudagin. Tá fara vit eftir sigrinum, men tað er heilt víst, at vit fara einki at fáa, um vit ikki fáa armarnar upp á pláss aftur nú beinanvegin. Sjálvandi kennist tað ógvuliga hugaligt, at vit hava fingið seks stig eftir tvey tey fyrstu umførini, og vit skulu taka góðu royndirnar við okkum, men einki kemur av sær sjálvum, og vit skulu stríðast fyri søkini.

*Hvussu ert tú nøgdur við tykkara avrik?*

- Eina løtu fyrsta partin av 2. hálvleiki sparkaðu vit ov nógv og spældu ov lítið. Men annars haldi eg, at tað var á góðari leið.

*Hvussu ber tað til, at tað gongur betri nú, enn tað gjørdi í fjør?*

- Eg haldi fleiri orsøkir eru til tað. Í fjør var tað sera órudduligt. Vit skiftu venjara, og nógvar broytingar vóru á liðnum, tí vit fingu nýtt fólk mitt í árinum. Nú hava vit eitt gott lið. Tað hevur havt týdning, at Poul Ennigarð er komin í verjuna. Símun Eliasen fyllir væl á miðvøllinum, og vit kenna teir báðar álopsspælararnar betri, enn vit gjørdu í fjør. Teir eru sera stinnir, heldur Eyðolvur R. Petersen.

*Tú gjørdi sjálvmál?*

- Ja, eitt flott mál! Eg helt satt at siga, at eg var longri úti, enn eg var. Ætlanin var við høvdinum at leggja aftur til Allan Joensen í málinum, men í staðin fór bólturin í bleytum boga upp um hann og í málið. Tað var gott, at hatta ikki kostaði sigurin!

*At royna afturlegging í so trongdari støðu boðar frá sjálvsáliti?*

- Ja, hatta var kanska ikki so skilagott, tí har vóru nógvir kring meg, og onkrir róptu, at tað var rangstøða. Men vit hava sjálvsálit, og venjarin vísir okkum álit. Moralurin er góður, og tað er gott grundarlag at byggja á.

# Trý mál á útivølli áttu at verið nóg mikið

**Hóast tað als ikki var nóg gott, so halda teir í Gøtu, at avrikið hesa ferð var frægari, enn tað var í fyrsta umfarinum, og teir siga seg ikki hava mist mótið**

GÍ SPÆLARIN

*Jóannes Hansen*

Tað stendur einki til í Gøtu. Eftir tvey tey fyrstu umførini eru teir einsamallir á aftasta plássinum. GÍ hevur einki stig. Undan kappingarbyrjan hevði tað kanska ikki verið mett at vera av leið at rokna við, at teir fóru at hava fulla úrtøku eftir tvey tey fyrstu umførini.

- Nei, tað hevur ikki verið nóg gott. Í fjør hilnaðist tað illa. Vit hava roknað við og væntað, at tað fór at ganga væl betri í ár, og tað gera vit framvegis. Men higartil hava vit tapt tvær ferðir.

Tað sigur Áslakur R. Petersen, sum er fuglfirðingur og býr í Fuglafirði. Í fleiri ár hevur hann verið á GÍ liðnum.

*Hví er úrtøkan so lítil?*

- Tað er tí, at tað hesa ferð fóru ov nógv mál ígjøgnum hjá okkum. At fáa trý mál á útivølli átti at havt verið nóg mikið til at fáa stig burturúr, men tað var tað ikki hesa ferð. Eg haldi, at avgerandi løtan var, tá ið teir fingu triðja málið. Vit høvdu akkurát javnað til 2-2, og vit trúðu upp á tað. So kom frammlegging við kós ímóti okkara máli. Hans Pauli var óheppin, tá ið hann royndi at stýra bóltinum við høvdinum. Hann bara snittaði bóltin, og so varð Magni á Lakjuni púra leysur.

*Beiggi tín hjálpti tær?*

- Ja, Eyðovur skoraði sjálvmál, og í útvarpinum søgdu teir, at tað var eg, sum hevði gjørt málið! Eg hugsaði ikki so nógv um tað, men nú tú spyrt, so haldi eg, at Eyðolvur spældi væl. Hann hekk í hvussu so er væl uppi í Popczynski.

*Kundi tú ikki hugsað tær at verið partur av ÍF og harvið verið á toppinum í staðin fyri í botninum?*

- Eg havi í fleiri ár verið í Gøtu. Har dámar mær væl, og vit rokna allir við, at stigini fara at koma, og at botnplássið harvið fer at verða skift út. Avrikið hesa ferð var betri enn ímóti EB/Streymi. Nú eiga vit heimavøll ímóti KÍ. Tað verður torført, men vit hava avgjørt møguleikan, heldur GÍ spælarin Áslakur R. Petersen.

ÍF-GÍ 4-3 (1-0):

# Tað sum vendi niður



*Fuglfirðingar eru í óvandari støðu. Teir eru einasta liðið, sum enn hevur f... grannarnir úr Gøtu*

**Við uppleggi og máli gjørdist innskifti Magni á Lakjuni at enda høvuðsmaðurin millum óføru fuglfirðingarnar, tá ið tað fyri fyrstu ferð í seytjan ár eydnaðist at senda gøtumenn tómhentar út um Eiðið**

FÓTBÓLTUR

*Jóannes Hansen*

*joannes@sosialurin.fo*

Tað man vera langt síðani, at fótbóltshugaðu fuglfirðingarnir eru farnir av plenuni og til hús at fáa sær seinnapartskaffi við so góðari kenslu, sum teir høvdu orsøk at hava sunnudagin.

Fyri fyrstu ferð í seytjan ár hevði ÍF vunnið á grannunum fyri uttan Eiðið, og fyri fyrstu ferð í eina fjórðings øld er ÍF einsamalt oddalið í bestu deildini. Og harafturat høvdu ÍF viðhaldsfólkini verið eygnavitni til uppgerð, sum hevði verið rættuliga undirhaldandi.

Á sentrala ÍF miðvøllinum høvdu Høgni Zachariassen og Símun Eliasen verið oman á mótstøðumonnunum, og útlendingarnir í ÍF álopinum stríddust, dugdu væl við bóltinum og sýndu gott hugflog.

Fyrstu løtuna í seinna umfarinum, eftir at ÍF verjan hevði verið rættuliga gáloysin, og Súni Olsen við brotssparki hevði javnað fyri gestirnar, var tað eitt sindur órudduligt. Men so gjørdist undirhaldsvirðið so høgt, sum tað sjáldan er. Fyrst og fremst tí tað varð so stutt millum málini, og tí møguleikarnir vóru nógvir. Serliga ÍF var vandamikið, tí GÍ noyddist at sleppa alt meiri í verjupartinum í royndini at fáa fyrsta stigið á árinum.

Tað eydnaðist ikki. GÍ hugflogið var einki serligt, og heimaliðið stóð seg manniliga í verjuni, har gøtumaðurin og fyrrverandi GÍ liðformaðurin, Poul Ennigarð, var millum teir stinnastu.

Úrslitið var 4-3, men tá ið ÍF liðformaðurin, Eyðolvur R. Petersen, hevði verið í gávuhýri og við høvdinum hevði stýrt bóltinum í sítt egna mál, var bara ein minuttur eftir av tíðini, sum Eiler Rasmussen hevði lagt afturat. Ta løtuna vísti Magni á Lakjuni, hvussu stóran týdning hann hevur fyri sítt lið. Tá ið ÍF hevði givið bóltin upp, fór Magni við honum fram í vinstru. Ætlanin hjá honum var at varðveita hann har, so eingin skaði spurdist burturúr í hinum endanum, og tað eydnaðist, hóast tríggir mótstøðumenn vóru kring hann.

## Góð ÍF mál

Bara eitt mál kom undan steðginum. Tað stútaði ÍF miðvallarin í høgru, Hanus Eliasen, eftir gott horna úr vinstru frá Gunnari Nielsen, sum saman við Sylla var sera væl upplagdur á toppinum.

Uppløgdu møguleikarnir vóru ikki so nógvir í 1. hálvleiki. ÍF legði grammari fyri, men sum hálvleikurin leið hevði GÍ hug at taka betri partar fyri seg. Popczynski var í 1. hálvleiki ofta afturi á miðvøllinum fyri at fáa skil á samanspælið, sum tað annars knípti hjá GÍ at fáa skil á. Súni Olsen var á toppinum, og viðhvørt tóktist tað sum um, at ÍF verjan ikki hevði hann í nóg stuttum tjóðri, men hann gjørdist ongantíð vandamikil undan hvíldini.

Tríggjar minuttir eftir steðgin var ÍF tjóðrið ov langt. Eftir GÍ framlegg úr høgru gjørdist Súni Olsen blankur frammanfyri tríggjar reyðar, og tá ið hann skuldi skjóta, varð hann trýstur niður.

Hjá fuglfirðingum, sum so ofta hava verið snýttir av GÍ, mundi hetta kennast sum vátur vøttur, men ÍF fótari sær. Magni á Lakjuni varð settur á miðvøllin í vinstru, og hann setti ikki fótin skeivan eina tí einastu ferðina. Hann legði fram til Sylla, sum í vinstru sneiddi seg leysan og smekkaði til. Hallur Hansen hálvbjargaði, og so var Gunnar Nielsen fyrstur á returinum.

Popczynski syrgdi fyri, at vónin hjá GÍ helt eina løtu afturat. Eftir álop í høgru og eitt sindur av trýsti, smekkaði hann til úr seytjan metum. Bólturin tók í ein av verjuspælarunum og snýtti Allan Joensen, og so var tað aftur javnt.

So var Magni á Lakjuni